# Dimmalætting

## Fríyrkisfólk til Dimmalætting

**UM STARVIÐ**

Sum journalistur í Miðlahúsinum arbeiðir tú við at gera free-lance tilfar til miðlar okkara, Dimmalætting og Dimma.fo.

Tú verður partur av eini dynamiskari redaktión, sum arbeiðir við tíðindum at kalla allan sólarkringin.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur journalistiska ella aðra viðkomandi útbúgving. Tú skalt hava royndir við tíðindaflutningi, og tú skalt tora at avdúka tað, sum onnur vilja halda dult. Tú skalt duga føroyskt væl og virðiliga bæði í skrift og talu og duga at skriva lætt og livandi og gott føroyskt mál.

**VIT VÆNTA**

- at tú brennur fyri tíðindaflutningi
- at tú hevur dirvi og áræði í tínum arbeiði
- at tú ert málsliga væl fyri
- at tú hevur góðan telduførleika
- at tú dugir og tímir at arbeiða sjálvstøðugt
- at tú dugir at halda høvdið kalt
- at tú hevur høgt trúvirði og góðan kritiskan sans.
- at tú dugir at arbeiða undir trýsti
- at tú dugir at gera av, hvat er viðkomandi tíðindaflutningur
- at tú ert klár/ur, tá ein søga skal forteljast

Dimmalætting

**VIT BJÓÐA**

- Eitt fjølbrytt og spennandi abreiðspláss
- Møguleika fyri í stóran mun at skapa tín egna arbeiðsdag
- Góðar starvsfelagar
- Eitt spennandi og áhugavert starv, har eingin dagur er líka
- Eitt starv, sum gevur tær innlit í øll viðurskifti í føroyska samfelagnum
- Føroya bestu plasering – í Vágsbotni í Havn

**LØN OG SETANARTREYTIR**

Starvið verður lønt sambært avtalu. Hevur tú spurningar, kanst tú skriva teldupost til Jonhard Hammer, stjóra á Dimmalætting jonhard@dimma.fo

Umsóknir skulu sendast til jonhard@dimma.fo